# At telja jólini

Santa Mortan

Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla
1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
3 flikki, 2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
4 fár, 3 flikki, 2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
5 fæ, 4 fár, 3 flikki, 2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
6 dúvur blá, sótu mær íhjá, 5 fæ, 4 fár,
3 flikki, 2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
7 silvurskálir, 6 dúvur blá, sótu mær íhjá,
5 fæ, 4 fár, 3 flikki, 2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
8 gangarar grá, gyltan saðil á, 7 silvurskálir,
6 dúvur blá, sótu mær íhjá, 5 fæ, 4 fár, 3 flikki, 2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
9 langskip við rá, 8 gangarar grá, gyltan saðil á, 7 silvurskálir, 6 dúvur blá, sótu mær íhjá,
5 fæ, 4 fár, 3 flikki, 2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
10 tunnur bjór, tað var teirra dreingja kór,
9 langskip við rá, 8 gangarar grá, gyltan saðil á, 7 silvur-skálir, 6 dúvur blá, sótu mær íhjá,
5 fæ, 4 fár, 3 flikki,2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
11 bukkar, fullu so væl í tokkar, 10 tunnur bjór, tað var teirra dreingja kór, 9 langskip við rá, 8 gangarar grá, gyltan saðil á, 7 silvurskálir, 6 dúvur blá, sótu mær íhjá, 5 fæ, 4 fár, 3 flikki, 2 gæs, 1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

\- - - - - - - -

*Mær gav santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*
20 stútir, nú eru jólini úti,
19 kvígur, nú munnu jólini líða,
18 stakkar, nú munnu jólini lække,
17 kjólar, gav hon teim til jóla,
16 hindir, allar vóru blindar,
15 svanir, allir vóru trænir,
14 ostar, fullu so væl í tostar,
13 húðir, strekkja við sínar búðir,
12 dreingir, bæði við reip og streingir,
11 bukkar, fullu so væl í tokkar,
10 tunnur bjór, tað var teirra dreingja kór,
9 langskip við rá,
8 gangarar grá, gyltan saðil á,
7 silvurskálir,
6 dúvur blá, sótu mær íhjá,
5 fæ,
4 fár,
3 flikki,
2 gæs,
1 fjøður av teim fugl’, ið væl kundi at flúva.

*Jólini verða tald á midnátt fastalávints mánakvøld. Umframt ’Mær gav santa Mortan’ verður ’Santa Simeon’ kvøðin – og okkurt annað við, t.d. “Bjerget ligger langt ud’ i skoven.” og “Mús pá korn”. jd*